# Víkingar á Fjørukrónni



**Tey sum reka Vestmanna Tourist Centre hava nú fingið tveir av figurunum til Søgusavnið heim**

TÍÐINDASKRIV

Søgusavnið skal halda til á ovaru hædd í Vestmanna Tourist Centre. Fyrstu figurarnir eru av Bresti og Havgrími, og teir eru avmyndaðir júst í teirri løtuni, tá Havgrímur gevur Bresti banasár við at renna spjótið gjøgnum hann. Tá Brestir kennir á sær, at nú fer hann at doyggja, dregur hann spjótið enn longur inn, fyri at røkka við svørinum so hann kann taka Havgrím við sær inn í deyðan.

### Fyrstu ferð í Føroyum

Tilfarið, sum verður nýtt at gera figurarnar úr, er Silikon, og talan er um fullkomin kopi av veruligum fólkum, sum hava staðið modell. Hetta er fyri at gera figurnarnar so livandi sum gjørligt, og sigast má, at íslendski listarmaðurin Ernst Backmann, sum hevur gjørt figurarnar, er komin sera væl frá uppgávuni. Ernst eigur SagaMuseum í Perluni í Reykjavík, hann hevur eisini gjørt allar figurarnar í hesum savninum.

Tey sum hava sæð víkingarnar á Fjørukrónni, hava øll verið á einum máli um, at teir líkjast sera nógv veruligum fólkum. Eisini ber til at siga, at hetta er fyrstu ferð at nakað líknandi sum hetta hevur verið at sæð í Føroyum. Og við hesum ynskja eigararnir av Fjørukrónni at geva fólki ein forsmakk uppá hvat Søgusavnið skal snúgva seg um.

Tað ber til at síggja figurnarnar í restaurant Fjørukrónni har teir fara at standa frammi í summar. Í summar er Fjørukrógvin opin allar dagar eisini flestu kvøld í vikuni. Meir kann lesast um verkætlanina og Fjørukrónna á www.visit-vestmanna.com










**Opel Combo** til sølu

*– stórur bilur fyri lítlan prís!*

Ein sera vælhildin Opel Combo 1.6 persónbilur til sølu. Bilurin er frá juni 2003 og hevur koyrt 53.000 km. Er økonomiskur, rúmligur og sera vælegnaður sum familjubilur. Hevur skjótihurðar í báðum síðum.

**Útgerð:** Nýggjar 17" alu-felgur/dekk, fjarstýrt sentrallás, el-rútar framman, tokulyktir, radio við fløguspælara, v.m.

**Prísuppskot: 118.000,-**

**Tel 21 19 96**



## Starv á lønarstovuni á Føroya Gjaldstovu



Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum. Á Gjaldstovuni arbeiða 32 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle Financials. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar: Felags lønarskipan, Búskettskipan, Leiðslukunningarskipan og Dátuvøruhús.

- Lønarstovan hevur um hendi stóran part av almennu lønaravgreiðslunum. Deildin umsitur Felags Lønarskipanina og ráðgevur í at brúka skipanina og nýstovnaðu WEB-løn veitingini.
- Arbeitt verður í løtuni at skipa eina Felags Lønarfyrisiting fyri landið, sum umframt at fyrisita Felags Lønarskipanina fer at fevna um tænastumannaeftirlønir, HR-umsiting og ráðgeving.
- Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan hevur eina flekstíðarskipan, og í Fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

Í løtuni eru 130 brúkarar í Felags Lønarskipanini

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**

**Eitt av starvsfólkum okkara fer í barnsburðarfarloyvi frá 1. juli 2007 til 1. februar 2008 og tí søkja vit eftir fólki at byrja 1. juli ella so skjótt sum til ber.**

**Uppgávurnar eru at:**

- skráseta og málsviðgera lønir
- koyra lønir
- rætta lønir
- bóka lønir
- svara lønarfyrispurningum

Viðkomandi sum situr í starvinum hevur umframt tikið sær av at

- ráðgeva um lønarskipanina
- gera úttrekk úr skipanini
- seta í verk webb-partin av lønarskipanini
- gera úttrekk úr Datavøruhúsi

**Krøv til starvið:** EDV-skipanir stuðla øllum arbeiðinum á gjaldstovuni og tí er tað ein fyritreyt, at tað liggur væl fyri hjá tær at brúka EDV og at seta teg inn í nýggjar loysnir. Ávís útbúgving er ikki kravd, men hevur tú júst lokið HH útbúgvining e.t., so er hetta ein møguleiki. Royndir á lønarøkinum er annar møguleiki. Hevur tú skrivstovuútbúgving/bankaútbúgving er hetta ein upplagdur møguleiki at royna teg á lønarøkinum. Tú skal vera álítandi, røkin og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti:** Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Starvið er sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett alt eftir útbúgving, royndum og førleika. Meira fæst at vita um starvið frá Guðny Simonsen, sum er at hitta á tlf. 352410 ella 214965.

**Umsókn:** Umsóknir við prógvum og møguliga viðmælum skulu verða send Føroya Gjaldstovu, Traðagøtu 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 29. mai 2007.

Dimmalætting